

# Børnini og Lindgren







SKÚLATILTAK

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Birgir Waag Høgnesen*

Sum so nógva aðrastaðni hava eisini vestmenningar havt kendu søgurnar hjá svenska barnabókarithøvundanum, Astrid Lindgren, sum evni hesa vikuna. Hetta er í sambandi viða, at Lindgren hevði fylt 100 í gjár, um hon var á lívi.

Næmingarnir í Vestmanna Skúla hava arbeitt við ymiskum sum: At baka pippibollar við spunk drússi, emilkøkur, nangijalaskuffukøgu við nangilima sjokolátu org Lindgrenlagkøku. Ymiskur lestur hevur verið á skránni við øllum teimum kendu: Pippi, Emil, Dikka, Lotta, Børnini í Dundurdali, Brøðurnir Leyvuhjarta, Ronja Ránsmannsdóttir og Mio mín Mio.

Eisini hava næmingarnir telgt Emil-figurar, gjørt dukkur og dukkufilmar, meðan onnur hava roynt seg við Lesiteaturi. Sjónleikur verður eisini við øllum teimum kendastu Lindgren-figurunum.

Her eru myndir úr Vestmanna í sambandi 100 ára haldið av Astrid Lindgren. Millum annað av køkuni, sum var 14,3 metrar long.